
*John, bróðir, við sekstantinum*


*F.v. aftanfyri Hugo, Jákup, framman Gardar og Richard*

sólin myrknaði, tá torvan stoytti undan bakkatromini.

## Roktúr til Aberdeen

Nei, sjómaður bleiv eg ongantíð, men álíkavæl hevur nokk eingin, hvørki pápi ella brøður, tá fingið ta úrtøku av sjónum eftir so stutta tíð, sum júst eg.

4. juli 1943 fóru vit sjey ella átta menn við Liljuni til Aberdeen við ísfiski. Vit seldu so vítt eg veit nógv fyri tað mesta, nakað skip inntil tá hevði selt. Eg haldi, at sølan var væl yvir 12 000 pund. Í hvussu er fekk eg 5.200 krónur hesar dagar. Tá var eg eisini við at taka fiskin inn av Stangarbrúnni og Norðdepli. Hetta var ein framúr inntøka tá í tíðini.

Tað, at eg slapp henda túrin, komst nokk av tí, at eg hevði bygt tvey ár undan og skyldaði hjá Kjølbro, og her munaði ein slík avrokning sera væl. Um hesa tíðina var nakað ófriðarligt og vandafult at sigla, og tað var kanska ikki so nógvur gravgangur at sleppa við.

Vit komu væl aftur og fram, og sóu ikki tað stóra til, at kríggj var. Nakrir spreingiknøttar flutu á sjónum, men flúgvarar vóru nógvir at síggja. Vit kendu teir ikki, og teir munnu vist hava verið enskir, ella hava teir verið týskir, og hava ikki havt meira lóður. Tað veit man ikki.

Sum eg havi sagt frá var mítt sjólív millum Nesjarnar og á reyðfiskaleið á Borðoyðavík.

## Beiggjarnir fara burtur

Sum sagt var pápi sjómaður burturav til eg mundi vera 13-14 ár og var hetta í 1929-30.

Pápi var á fyrsta motorpassaraskeiðinum her í Føroyum, tað eg veit. Haldi tað var í 1912.

Aðrir høvdu nokk fingið prógv áður, men hetta mundu vera einstaklingar her og har, sum hava lært á onkrum donskum marinuskipi.

Millum hesar sjógarparnar beyð eg mær lítið, tá til prátið á hesum økinum kom. Serliga tá tað viðvíkti trolarum. At tosa um sluppinar stóð betur til. Eg var við, tá tað kom til vantið, krosstræ, spryt, mesan, toppsegl, bidewind, skylett og annað.

Men til trolarnar og hvat var keysing, breidlar stroppir, veingir, millumstykki, kvartarroppar, gylsar, sperlar, sperlastjórar, nei tá var eg hvassur.

Tey 4 árini eg var niðri, var sum sagt stór broyting farin fram í heimi okkara. Jákup og Absalon vóru blivnir skipsmenn og vóru farnir at »fortjena«. John, Erland, Benni, Karla og Villiam gingu í skúla. Solborg, sum nú var vaksin og trúlovað, hevði aftur at mammu alt hitt hangandi á herðum sínum. Okkurt skifti vóru tó arbeiðskonur.

Tá ið eg sigi fortjena, so mugu vit ikki hugsa, at vit ikki høvdu verið við at forvunnið nakrar krónu her og har, so skjótt høvi gavst. Sum fyrr sagt, tað var bæði í fiskaarbeiði, at bera sand úr fjøruni og okkurt annað, tá vit vóru so frægir, at menn kundu lata okkum halda á einum spaka, kvísl ella haka. Bisquit keksablikkassarnir vóru nógv nýttir til smádreingir tá á døgum. Tað vóru stórar nøgdir bornar av smádreingjum við keksakassunum. Serliga vóru teir nýttir til sand.

Onnur systur mín, Solborg, var gift við John á Geilagarði í Leirvík. Eisini hann man hava verið av røsku sjógørpum Føroya. Han sigldi víðan knøttin og Solborg saman við honum. Var hon ung í dag, hevði hon óivað verið skipsførari. Hon hevði í hvussu er egnað seg til tað!

Tað blivu so Karla systir og eg, sum so at siga, einki høvdu við sjógvin at gera, uttan hetta, at slongst aftur og fram millum sjógarparnar.

Onkrir av okkum hava nú drigið bátin, drigið sláirnar fyri og læst neystahurðarnar, og sagt farvæl. Aðrir hava lagt árarnar, eru komnir í taran og stríðast við at draga.

Bert ein baksast einsamallur har úti víðan kring oyggjarnar, inn at Íðini, úti millum Nesjana. Tað er Benni. Hevur hann heilsuna, verður hann 80 í ár.

Onkrir av okkum eru farnir inn um »Grynnuna«, inn á Vánna, komnir í »havn«. Aðrir liggja á Pollinum og rigga av.

Vit takka Jógvan fyri hesa áhugaverdu frásøgnina. Kanska fara vit at frætta frá honum aftur!

## Ættin

Foreldrini hjá pápanum:
Joen Joensen (Gardar), var føddur í 1867. Hann giftist í 1891 við Sybillu Malenu Hendriksen av Sandi. Hann var vanliga kallaður Gardar, og fekk sær hetta til eftirnavn. Tey fingu børnini: Jacob, Richard, Amanda, Agnes, Anna Malena, Hugo, Sofía Petrina og Hilma.

**Foreldur:**
Jacob Joensen, f. 1892, eisini kallaður Jakku á Geilini, giftist í 1915 við Malvinu Simonu M. A. Steffensen úr Árnafirði.

**Børn:**
Jógvan Gerðalíð f. 1916, giftist í 1941 við Astrid Kathrinu Simonsen av Gørðum. Børn teirra: Jákup, Jens Christian, Øssur og Henny.

Jacob Edvard, f. 1919, giftur í 1944 við Steinvør Heinesen úr Kunoy. Børn teirra: Leivur, Heini, doyði ársgamal, Ingun og Anna Maria.

Solborg f. 1920, gift í 1941 við John Joensen úr Lorvík, har tey búsettust. Børn teirra: Sofus, Jákup, Marjun, Jósleiv, Anna, Ingvar, Sólbjørg og Jónvør.

Absalon f. 1922. Giftur í 1947 við Adeilheid Eliassen úr Fuglafirði. Børn teirra: Hanus, Malan, Anfinn, Petur Jónsvein og Jan.

John, f. 1923, giftur í 1953 við Daisy Niclassen úr Hvalba
Børn teirra: Joan, Viggo og Maj.

Erland, f. 1926, giftist í 1947 við Margrethu Solmunde úr Gøtu. Hon var dóttir Miu og Sofus Solmunde. Sofus fórst við Immanuel í 1932, og Mia livdi til hon gjørdist 100 ár. Børn teirra: Sofus, Jákup, Andrass og Eva. Erland átti eisini Einar.

Benjamin, f. 1927, giftur í 1954 við Hansu Danielsen úr Fuglafirði. Børn teirra: Rúna, Gudny, Viktoria og Jákup.

Karla f. 1930, gift í 1952 við Dánjal Dánjalsson úr Fuglafirði. Børn teirra: Victor, Malvina, Henrikka, Jórun, Elsba og Eydna.

William, f. 1931, giftur í 1953 við Huldu Gaasedal úr Gásadali. Børn teirra: Jens Edmund, Jacob og Johanna Paulina.

Erland og Absalon eru deyðir.

Sosialurin